tíðindablaðið
sosialurin

Abyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Justinus L. Eidesgaard - Eydun Klakkstein - Eirikur Lindenskov - Áki Bartholdsen

Útgevari, uppseting og prent: P/I Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 78 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Syndarlig støða

Oddagrein

Tað er ein syndarlig støða, sum tikið hevur seg upp í Ísrael hesar seinastu dagarnar. Nú tá vónirnar til eina framhaldandi friðartilgongd vóru so góðar, hendu hesar ræðuliga sjálvmorðsatsóknirnar.

FANATISMU og fundamentalismu kanst tú lítið gera við. At fara í hernað móti henni er sum at gera ilt verri. Hetta er dilemmaið hjá Ísrael í dag, har terroratsóknir frá Hamas-fanatikarum hava lopið ótta á alt fólkið.

HER eru góð ráð dýr. Tað finst nevniliga eingin patentloysn fyri, hvussu tú fær bilbukt við fanatiskum fundamentalistum. Hetta kenna vit alt ov væl úr okkara egna grannalag, Norðurírlandi.

TAÐ er tí alt annað enn nøkur løtt uppgáva hjá Peres og stjórn hansara at taka stig fyri at forða fyri fleiri atsóknum. Tú kanst sjálvandi ikki gera ein handil - eina avtalu - við slíkar drápsmenn, men trupulleikin er bara tann, at tú kanst heldur ikki gera nógv annað. Tú kanst royna at sláa hart niður á øll viðhaldsfólk, men tá kemur tú aftur til at raka ósek, og slík gongd kann so bara elva til móttrýst. Hetta er sum eitt tvíeggjað svørð.

SJÁLVANDI er ísraelska stjórnin noydd til at gera alt fyri at vinna á hesum terroristum, men har brúkast vit og skil. Tú fær ikki frið ella sleppur undan drápum við at fara fram eirindaleyst móti eini fjøld av fólki, sum tú illtonkir, men sum tú ongi prógv hevur móti. Tí skal tað vera okkara vón, at ísraelar ikki leypa framav og gera seg inn á palestinar og arabar yvir ein kamb. Hevndin el la revsingin tænir ongum endamáli, fær tú ikki fatur á teimum seku. Vónandi verða teir víðgongdu at tapa og teir hóvligu at vinna.

Sosialurin

Viðmerking

Nøkur orð um infrastruktur

Í Sosialinum tann 15. febr. 1996 skrivar Óli M. Lassen eina grein um tilverugrundarlag Føroya og alternativar vinnuvegir. Tað, sum eg serliga hefti meg við í hesi grein er í fyrsta lagi sjálvur spurningurin, sum settur er: Hvørjum liva vit av um 5–10 ár (mín tulking)?

Í øðrum lagi vísir greinskrivarin á onnur viðurskifti enn »eginkapital« og »figging«, sum annars tykist taka mesta plássið í viðgerðini av hesum evni.

Í hesum sambandi skal eg royna at siga nøkur orð um infrastruktur. Hetta er nakað av tí, sum skjøtil var settur á við prosjektinum Føroya Export Match, 1994, hvørs endamál var at kortleggja møguleikar fyri alternativum vinnumøguleikum.

Tá vit nevna orðið »infrastruktur«, so hugsa vit oftast um vegir, havnir, el, telefon o.t. Hetta hava vit gjørt íløgur í síðan aldarskiftið. Høvuðseyðkenni við hesum infrastrukturi eru:

1. Har tað fyrr »bar til«, har er tað nú ómakaleyst. Her verður t.d. hugsað um, at tað jú bar til at geva boð frá sær áðrenn telefonina, men nú er tað ómakaleyst.
2. Øll hava atkomu.
3. Onkur skipan – stovnur, felag e.t. – dagførir og røkir amboðini dagliga.
4. Hendan skipan virkar um tíðirnar eru góðar ella ringar.
5. Samskiftið við sambærligar skipanir í øðrum londum er ein høvuðsstuðul undir uppgávuni, at røkja infrastrukturin og dagføra hann við skili.

Í mínum víðkaða infrastrukturhugtaki er nú rættiliga vanligt eisini at rokna t.d. almannaverk, skúlaverk, bankakervi o.a.m.

Í ídnaðarmenningini undan og um aldarskiftið vuksu ídnaðarvirkini kring havnabýir, jarnbreytastøðir og annars har, sum farleiðir møttust.

Í dag vaksa virkir har, sum tað ómakaleyst ber til at bøta um førleikan – og harvið kappingarførið – hvønn einasta dag.

Í størri londum kemur hendan dagliga førleikaábótin partvíst við útbúgvingarskipanini, granskingardeplum, kommunalum vinnustovum, regluligum framsýningartiltøkum o.m.ø.

Vit kunnu á ein hátt siga, at í dag vaksa virkir kring eitt slag av infrastrukturi, sum hevur til endamáls at virka fyri at flestu okkara ómakaleyst kunnu bøta um førleikan at røkja okkara uppgávu hvønn einasta dag – í góðum sum í ringum tíðum. Ein infrastruktur við somu omanfyri nevndu høvuðseyðkennum. Vit kunnu kalla hetta ein vitanarinfrastruktur.

Vit megnaðu, í tíðum, sum vóru verri enn hesar, at byggja upp eitt telefonnet, vegir, havnir el o.m.a. Forfedrar byrjaðu í smáum við tí, sum bar til. Uttan hendan infrastruktur var ongin modernað vinna í Føroyum í dag, ongin profitteind í vanligum týdningi.

Tann infrastrukturur, sum er neyðugur fyri at halda eini nýggjari modernaðari vinnu kappingarføra, má eisini byggjast upp frá tí, sum vit longu hava. Vit noyðast at seta á har, sum tað í praksis ber til at seta skjøtil á.

Tað, sum FEM prosjektið legði serligan dent á, var ein Vinnustova, sum er ein samskipan av vinnuskúlum (t.e. maskinskúli, tekniskur skúli, handilsskúli o.t.), Menningarstovuni og almennum fíggingarstovnum.

Tey fyrstu stigini fram ímóti einum slíkum infrastrukturi liggja í eini bygnaðarbroyting í tí almenna sektorinum. Tað er har, vit hava útbúgvið fólk, amboð, arbeiðstímar og sambond uttaneftir, sum kann vera lykilin til at gera annars rímilig vinnutiltøk til »bæredygtige projekter«.

Hendan bygnaðarbroytingin kann sjálvsagt ikki vera ein tilvildarlig broyting, sum gongur fram eftir fummum. Neyðugt er at seta sær greiðan setning fyri, hvønn leiklut tann almenn sektorurin skal hava, serliga í vinnuliga høpinum. Annars kann ein bygnaðarbroyting skjótt gera ilt verri.

Tað, vit fyrst skulu arbeiða fram ímóti, er at skapa eina skipan, eitt stað, eina leiðslu, har tann, sum hevur gitið eina handilsætlan,



ómakaleyst kann venda sær, uttan at verða dømdur uppá, at ætlanin ikki er burðardygg, men sum heldur verður spurdur, hvussu vit koma longur ávegis – eina skipan, sum hevur ítøkiligan møguleika at gera nakað fyri at fáa ætlanina burðardygga.

Eitt stað, har tann, sum hevur ítøkiliga vitan um ábøtur á verandi vinnumhvørvi, kann verða hoyrdur og rokna við, at vitanin verður viðgjørd og innbygd í tær dagføringar, sum gjørdar verða.

Vit hava fleiri dømi um bæði virkir og einstaklingar, sum hava roynt at byggja eina virkisætlan upp, men sum eyðvitað hava kent seg veik á ymsum økjum og hava leitað sær ráð. Tey hava ofta kent tað sum eina ferð frá Heródes til Pilatus, uttan at nakar hevur havt ítøkiligan møguleika til at geva neyðugu hjálpina heilt ítøkiliga.

Vit hava eisini eitt dømi um »tilfeingisdepil-hugskotið«, sum savnaði dust í einihvørji skuffu og nú knappliga kom fram aftur, sum ketta úr høvdatrogi.

Ja, tað, at Óli Jacobsen so altráður vildi úti í Tinganes at fáa hjólini aftur á rull uttan úrslit, sigur ikki so nógv um Óla, sum tað sigur um tann infrastrukturin, sum als ikki er til í løtuni.

Kjakið um oljuna bendir sama veg. Her er í veruleikanum ongin myndugleiki, sum vil verja borg og vinna land fyri føroyska vinnu.

Vit teknikarar, sum arbeiða við hesum spurningum, kunnu koma fram við hugsanum. Vinnan, sum virkar í dag, kann í størri ella minni mun stuðla hesum hugsanum. Tað er tó ikki vist, at bøndurnir um aldarskiftið – ,að er »vinnan« tá – sóu so stórar møguleikar í sluppunum.

Men tað eru bert politikarar, sum formelt kunnu seta kós fyri framtíðar møguleikum føroyinga í Føroyum. Teir sita á uppgávuni at seta karmar, trongar ella víðar, fyri virkis- og menningarmøguleikum okkara.

Politikarar eiga uppgávuna at byggja infrastrukturin! Tað er hann, sum skapar teir ítøkiligu karmarnar.

Tað er ikki øðrvísi í okkara tíð enn í tíð teirra, sum undan gingu: Verður ikki skjøtil settur á hendan infrastrukturin, so er bert spurningur um stutta tíð, so er okkara kappingarføri ikki til, uttan mun til kostnaðarstøði, útbúgvingarstøði, góð fiskiár, góð oljuár ella hvat vit kunnu nevna av slíkum slag.

Signar P. Heinesen